Ronja:

# Spennandi sangleikur um frið og rættvísi



*Tey hava júst undirskrivað samstarvsavtaluna um Ronju Ránsmannadóttir – v.m. Bo frá Tórshavnar Musikkskúla, Niels Halm frá Norðurlandahúsinum, Jenny Petersen frá Tjóðpallinum og Joan Stampe frá Føroya Banka*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

**Mong hava helst lisið søguna um Ronju Ránsmannadóttur. Onkur hevur kanska eisini sæð hana á filmi. Men tað munnu vera tey fægstu, sum hava sæð hesa spennandi søguna sum sangleik**

SANGLEIKUR

*Snorri Brend*

**Havn:** Hesin møguleikin verður nú til staðar á fyrsta sinni leygardagin 5. november í Norðurlandahúsinum.

Henda dagin verður nevniliga fyrsta framførslan av Ronju Ránsmannadóttir við føroyskum leikarum, føroyskum tónleikarum, føroyskum leikpalli og alt á føroyskar grund.

Tjóðpallurin, Norðurlandahúsið og Musikkskúlin eru farin undir eitt spennandi samstarv um henda kenda leikin. Og fyrrapartin í gjár kom enn ein partnari við í felagsskapin – Føroya Banki, sum letur stuðul til leikin, hvørs kostnaður liggur um 1,4 mió. kr.

- Hetta er eitt sera spennandi samstarv, sum vit nú eru farin inn í. Og vit vóna sjálvandi, at hetta verður byrjanin til fleiri slíkar ætlanir.

- Eitt er so púra vist: Fingu vit ikki henda stuðulin frá Føroya Banka, so hevði als ikki borið til at víst føroyingum henda spennandi leikin, sigur Jenny Petersen, leiðari í Tjóðpalli Føroya.

Venjingarnar av leikinum eru longu byrjaðar undir kønari hond av Eyðuni Johannesen. Og um seks vikur sleppur so føroyska familjan til henda leikin, sum í fyrsta umfari verður framførdur 15 ferðir.

Hetta er ein spennandi og áhugaverdur leikur, har hugtøk verða sett upp móti hvørjum øðrum – so sum friður, rættvísi og kærleiki.

### Góðir leikarar

Hetta er eitt megnar prosjekt, sum leikararnir nú eru farnir undir. Ikki færri enn 60 fólk eru við í leikinum.

Kvinnuliga høvuðsleiklutin sum Ronja eigur Barbara Hentze í Stórustovu. Tað er ikki fyrsta ferðin, at Barbara, sum gongur í 10. flokki, er á palli. Hon hevur roynt seg áður í leikinum um Rasmus Montanus.

Tað vísti seg tá, at hon riggaði væl í tí leikinum og var góð at samstarva við.

- Tá ein velur ein leikara til ein høvuðsleiklut, so er neyðugt at viðkomandi megnar at bera hesa ábyrgdina.

- Viðkomandi má eisini síggja álvaran í tí leikinum hann er við í, og má samstundis verða sinnaður at lata onnur siga "hvordan og hvorledes". Og hesar dygdirnar, tær hevur Barbara, varð sligið fast á tíðindafundi í gjár.

Ofta hevur verið truplari at finna teir mannligu høvuðsleikararnar. Men her hava tey eisini verið heppin í valinum av Petur Meinhard Elleby Andersen.

### Renna saman í eitt

Umframt venjingina av hesum leikarunum og øllum hinum, skal eitt stórt arbeiði gerast fyri at fáa leikarar, tónleikarar og pall at renna saman í eitt.

Fleiri yrkisleikarar eru eisini við í leikinum, og koma hesi at hava skeið fyri hinum í, hvussu leikast skal.

Sum ein eyka íblástur kemur tónasmiðurin, Sebastian sjálvur til Føroyar í næsta mánaði at leggja tónleikarunum lag á.

Leikurin er sýndur fleiri hundrað ferðir í Íslandi og Noregi, og skal aftur á pall í Íslandi til heystar.

Føroya Banki:

## Spennandi samstarv

Uttan stuðulin frá Føroya Banka hevði ikki borið til at sett ein so stóran leik á pall her á landi.

At hesin peningastovnurin hevur valt at stuðla leikin, er ikki nakað eindømi hjá teimum. Tá leikurin um Jósef varð spældur á sinni var Føroya Banki eisini høvuðsstuðul.

- Vit hava valt at stuðla hesum leikinum, tí vit halda at hetta er ein áhugaverdur leikur, sum bæði er til børn og vaksin.

- Okkara ynski er sjálvandi at gerast sjónlig í samfelagnum, og eisini at spjaða stuðulin sundur. Á henda hátt, fáa so nógvar greinar sum gjørligt gleði av okkara stuðli, sigur Joan Stampe frá Føroya Banka.

Samstarvið millum bankan og leikin kemur m.a. at verða so, at tey nýggjastu tíðindini frá leikinum verða løgd út so hvørt á heimasíðuna hjá bankanum. Somuleiðis kunnu fólk keypa atgongumerki til leikin umvegis hesa somu heimasíðuna.

## Ronja Ránsmansdóttir

**eftir Astrid Lindgren, tónleikur Sebastian**
**Samstarv millum Norðurlandahúsið, Tórshavnar Musikkskúla og Tjóðpall Føroya**

Høvuðsstuðul til verkætlanina er Føroya Banki

| | |
|---|---|
| Leikstjórn: | Eyðun Johannessen |
| Pallmynd og búnar: | Edward Fuglø |
| Ljósdesign: | Árni Baldvinsson |
| Sangvenjing: | Sigrid Sivertsen |
| Kapelmeistarar: | Eirikur Skála og Leivur Thomsen |
| Pallsmíð: | Verkstaðurin hjá Hermanni Eysturoy |
| Standa fyri seyming av búnum: | Kristin Bæk |
| Framleiðslustjóri: | Kristina Hansen |
| Týtt tekstin: | Ria Tórgarð |
| Týtt sangir: | Súsanna Tórgarð |
| Ronja: | Barabara Hentze í Stórustovu |
| Birk: | Petur Meinhard Elleby Andersen |

Tey, ið annars eru við: Leikarar frá Tjóðpalli Føroya og leikarar frá Dramaverkstaðnum, sjónleikarskúlanum hjá Havnar Sjónleikarafelag, leikarar frá Havnar Sjónleikarafelag, kórsangarar o.o

Tónleikarar eru næmingar frá Tórshavnar Musikkskúla

# Bóklingur um umhvørvi og oljuleiting í Føroyum




**Heilsufrøðiliga starvsstovan hevur í samstarvi við Innlendismálaráðið og Føroya OljuÍdnaðar Bólk (FoíB) gjørt ein bókling um umhvørvi og oljuleiting, nevndur »Umhvørvi og oljuleiting, umhvørvislig krøv og kanningar á føroyskum øki«**

BÓKLINGUR

Endamálið við bóklinginum er at lýsa, hvussu fyrilit fyri umhvørvisvernd hava verið tryggjað gjøgnum alla gongdina, frá tí at eitt oljufelag fer undir at gera ætlanir fyri leitivirksemi, og til eftirkanningar rundanum sjálvt boriholið eru gjørdar.

Bóklingurin gevur innlit í, hvussu oljuleiting fer fram, og hvørji umhvørvislig krøv oljufeløgini skulu lúka, áðrenn loyvi fæst til at seta borin í føroysku undirgrundina.

Bóklingurin gevur eisini eitt yvirlit yvir tær umhvørviskanningar, ið gjørdar vórðu, áðrenn og aftaná at fyrsta leitiumfar fór av bakkastokki. Endamálið við umhvørviskanningunum er at geva myndugleikum og oljufeløgum eitt støði at meta um, hvørji árin leitiboringarnar hava á føroyska umhvørvið, og fyri at staðfesta møguliga dálking. Kanningarnar eru í flestu førum gjørdar av føroyskum myndugleikum, stovnum og granskarum, við fíggjarligum stuðli frá oljufeløgunum.

Nú fýra leitibrunnar eru boraðir í føroyskum øki, er útlátið í havið og í luftina av dálkandi evnum gjørt upp, eins og mett er um árinini, ið hesi evni hava havt á umhvørvið í leitiøkinum.

Bóklingurin er ætlaður øllum, ið hava áhuga fyri umhvørvi og oljuleiting, og hevur ætlanin verið at gjørt eina lættlesiliga frágreiðing við nógvum myndum og talvum. Allir teir hægru og miðnámsskúlarnir fáa eitt flokssett av bóklinginum sendandi.

Frágreiðingin er skrivað av Suna Petersen, Katrini Hoydal og Mariu Dam frá Heilsufrøðiligu starvsstovuni og Anni á Hædd frá Innlendismálaráðnum; formaðurin í Umhvørvisbólkinum hjá FOÍB hevur eisini luttikið. Nógv fakfólk frá nógvum ymsum stovnum hava stuðlað arbeiðnum við bóklinginum á ymiskan hátt. Sniðgivið hevur Elisabeth Sande.

Frágreiðingin verður eisini tøk á heimasíðu okkara www.hfs.fo, undir "útgávur". Fleiri eintøk av prentaðu útgávuni kunnu umbiðast frá Heilsufrøðiligu starvsstovuni.

# Jólainnkeyp í Pólandi

FERÐING

Stuttleika- og innkeypsferðin, sum áhugafelagið Hugnaferðir skipar fyri til Pólands, fær góða undirtøku. Bara nakrir heilt fáir ferðaseðlar eru eftir til ferðina, sum verður í heystfrítíðini, úr Føroyum 6. oktober og heimaftur tann 17.

Talan er um eina bussferð við Isaksens Bussum til Stettin við møguleika at vitja t. d. Gdansk eisini.

Í Stettin verða útferðir gjørdar til tær velduga stóru innkeypsmiðstøðirnar, og sjálvandi verður vitjað á teimum mongu stóru gøtuhandlunum, har jólasølan longu so smátt er farin í gongd.

Ferðin er avbera bílig, ferðaseðilin kostar bara 4.768,- krónur og umfatar ferð við Norrønu við morgunmati, bussferðina og uppihald á Hotel Julian í Stettin í eina viku við morgunmati.

Sum sagt eru bara nakrir fáir ferðaseðlar eftir, sum kunnu bíleggjast hjá Hugnaferðum á tel. 215558. Sí annars lýsing aðrastaðni í blaðnum.